gult28 cyan28 magenta28 svart28



# Pedagogar til Dagstovnin á Oyri

Søkt verður eftir 2 pedagogum til vøggustovuna. Eitt starv er 30, møguliga 40, tímar viku, at byrja 6. august, og eitt starv er 30 tímar viku fyri pedagog í barnsburðarfarloyvi, at byrja 6. august og fyribils til 1. mai 2002.

Dagstovnurin er normeraður til 40 børn, sum er uppdeild í 3 bólkar:

**Stórustova** 16 børn 4–7 ár
**Innistova** 10 børn 3–4 ár
**Vøggustovan** 14 børn 0–3 ár

Vit eru í náttúruvinarligum umhvørvi við haga og fjøru og leggja stóran dent á at nýta hetta í gerandisdegnum.

Størvini verða fyribils lønt sambært sáttmála ímillum Føroya Pedagogfelag og Føroya Landsstýri í 11/13 lønarflokki.

Umsóknir við prógvi og møguligum viðmælum skulu vera stovninum í hendi í seinasta lagi 22. juni 2001.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til leiðaran Rosu Prestá, ella varaleiðaran Sólrún Dam, á tlf. 422552.

**Dagstovnurin á Oyri**
450 Oyri
tlf. 422552 - fax 422632

# Telefonpassari

Søkt verður eftir frítíðaravloysara fyri telefonpassaran frá 16. juli til 19. august 2001.

Starvið fevnir í høvuðsheitinum um telefonpassan, sjúklingaleiðbeining og postavgreiðslu.

Starvið verður lønt samb. sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

Nærri upplýsingar viðvíkjandi arbeiðstíð v.m. fáast við at venda sær til Bergur V. Stórhamar, fulltrúa lokal 140.

Skrivlig umsókn við upplýsing um starvsroyndir verður at senda til

**Suðuroyar Sjúkrahús**
Umsjónarmaðurin
800 Tvøroyri

**Umsóknarfreist: 17. juni 2001.**

# Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari
**BERGUR Á REYNATRØÐ**
Børkuvegur, 620 Runavík
**Tlf. 448480**
Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 9-16

# Frítíðarskúlin í Sunda Kommunu

Søkt verður eftir 1 pedagogi 30 tímar viku og 1 hjálparfólki 30 tímar viku, at byrja 13. august.

Skipanin við frítíðarskúla í Sunda Kommunu er nýggj og er ein partur av Dagstovninumá Oyri.

Frítíðarskúlin fer at halda til í skúlanum og letur upp fyrstu ferð, tá skúlin byrjar aftur 20. august.

**Vit ynskja at umsøkjararnir:**

- kunnu arbeiða sjálvstøðugt,
- kunnu samstarva við dagstovnin, skúlan og foreldur,
- dáma væl at vera úti í náttúruni saman við børnunum,
- kunnu skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum.

Størvini verða fyribils lønt sambært sáttmála ímillum Føroya Pedagogfelag og Føroya Landsstýri.

Umsóknir við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera stovninum í hendi í seinasta lagi 15. juni 2001.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til leiðaran Rosu Prestá, ella varaleiðaran Sólrún Dam, á tlf. 422552.

**Dagstovnurin á Oyri**
450 Oyri
tlf. 422552 - fax 422632

# Miðvágs-Sandavágs skúli søkir eftir 4 lærarum til skúlaárið 2001/2002

**2 størv** 26.5 tímar fyri lærarar í farloyvi
**1 starv** 20 tímar til drong í 9. flokki við serligum tørvi
**1 starv** uml. 24 tímar fyri lærarar, sum hava niðursett tímatal.

Størvini, sum eru tíðaravmarkaði til skúlaárið 2001/2002 verða lønt sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokki 18.1 til 27.4.

Umsøkjarar, sum kunnu undirvísa í dreingjaítrótti hava fyrimun. Meira fæst at vita um størvini hjá skúlastjóranum telefon 332820.

Umsóknir skulu verða skúlanevndini í hendi í seinasta lagi mikudagin 20 juni 2001. Við umsóknini eigur avrit av prógvi og møguligum viðmælum at verða send við.

**Miðvágs-Sandavágs skúlanevnd**
V/ Kristionnu á Lofti
360 Sandavágur

Í Miðvágs-Sandavágs skúla eru 264 børn og 24 lærarar.

**Toll- og Skattstova Føroya**
**Stýrið**

# Skrivari

Vegna barnsburðarfarloyvi er avloysarastarv sum skrivari á lógardeildini í Stýrinum fyri Toll- og Skattstovu Føroya leyst at søkja til setan frá 1. august 2001 ella skjótast til ber og til 1. september 2002.

**Arbeiðsuppgávur**
Skrivarin røkir m.a. hesar uppgávur:
• heldur skil á málum
• fyrireikar mál
• skrivar brøv
• setir upp rundskriv, kunningarskriv, vegleiðingar o.a.
• rættlesur og umsetir t.d. brøv, viðmerkingar til lógir o.a.
• málsviðgerð

**Førleikakrøv**
Vit vænta okkum, at skrivarin hevur hesar førleikar og eginleikar:
• góðar samskiftisførleikar
• dugir at nýta Microsoft Word og Outlook – hetta er ein fyrimunur ikki eitt krav
• setir seg skjótt inn í ymisk viðurskifti
• sjálvstøðugan arbeiðshátt og kann raðfesta arbeiðið
• góð samstarvsevni

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður lønt í 3. lønarflokki í sáttmálanum millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálastýrið. Løn og setanarviðurskifti verða ásett eftir sama sáttmála.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Anju Hovgaard á tlf. 35 26 00.

**Umsóknir**
Umsóknir við avritum av prógvum og viðmælum um viðkomandi starvsroyndir skulu vera Toll- og Skattstovuni í hendi í seinasta lagi 21. juni 2001.

**Toll- og Skattstova Føroya**
Stýrið
Traðagøta 39
Postboks 2151
FO-165 Argir

Toll og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálastýrinum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, avgjalds-, mvg- og inntøkuskattalóggávuna, herundir eisini kolvetnisskattalóggávuna, og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum og fyri onnur lond har sáttmáli fyriliggur. Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum.Tær seks økisskrivstovurnar, sum eru í Klaksvík, Saltangará, Sørvági, Skopun, á Tvøroyri og í Tórshavn, røkja raksturin. Í Stýrinum, har viðkomandi kemur at starvast, eru 34 starvsfólk, og er tað skipað í fimm deildir.

# KIA CARNIVAL

**2.9 Dohc Turbo-Diesel16 V, 126 HK, 5 hurðar**



**Rætti bilurin til mong endamál.**
**Pláss fyri 7 fólkum og hópin av viðføri.**

D. B. Bilar
**Tel. 310 600**

Lesið Sosialurin -tað loysir seg



# Uppsetan og skipan av barrum

*Til:*
*Brúdleyp*
*Rundar føðingardagar*
*Starvsfólkaveitslur*
*Ársveitslur*
*Reseptiónir*
*og tilíkt*





*Hans á Lag Sp/f*
*Tlf. 21 93 83*
*hanslag@post.olivant.fo*

Sosialurin 311820

HIGH PERFORMANCE AUTO CARE PRODUCTS
Formula 1 PROFESSIONAL

# Shine-It-All



Fyrsta floks bonið frá Formula 1 hevur verið í sølu á íslandi í umleið 2 ár og hevur eydnast væl. Tí tað er ikki hvønn dag at ein nýggj vøra kemur inn á marknaðin sum minkar um stríðið og tíðuna hjá teimum sum brúka hana. Tað er júst tað, ið **Shine-It-All** ger.

Tá ið tú brúkar **Shine-It-All**, kanst tú bona allan bilin beinanvegin, uttan at stúra fyri at bon-plettir kykna upp. Men hvat við t.d. gummi og plastik listarnir? - Gott at tú spyrt! Tí **Shine-It-All** klárar tað. Tá ið vit søgdu, at tú kanst bona **allan** bilin beinanvegin, tvætlaðu vit ikki og glansurin er ótrúliga góður. Eftir nøkur vask er væntandi at tú sært, at **Shine-It-All** gevur betur úrslit en nógv onnur væl umtøkt bon.

**Formula 1 Auto Care bilsminkan uttan sum innan**

AJG.Billutir
Klaksvíksvegur 37
700 Klaksvík
Tlf. 458011 · Fax. 458012

# Tær hava vit brúk fyri

**á fiskivinnudeildini**

Grundað á økt virksemi á fiskivinnudeild okkara, hava vit tørv á teknikkarum. Vit hava brúk fyri tær, um tú

- ert nærlagdur og álítandi
- hevur áhuga fyri tøkni, stýringum og telduumhvørvi
- kannst arbeiða sjálvstøðugt og saman við øðrum
- ert millum 20 og 35 ár

til eitt spennandi og mennandi starv, har tú verður útbúgvin at arbeiða við Marel framleiðslu- og skrásetingarútgerð til fiskiídnaðin.

Løn sambært avtalu.

Sendið skrivliga umsókn til Formula.fo, tilskrivað Hans Paula Petersen innan 17.06.01.

Vil tú hava meira at vita um størvini, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Hans Paula ella Torkil Holm á tel. 311115.

**formula.fo**
Postboks 1078 • 110 Tórshavn
Tel: 311115 • Fax: 317115 • T-post: starv@formula.fo

# FRIMÆRKER OG MØNTER SØGES!

**Gratis vurdering i Thorshavn.**



**Fredag den 8. juni kl. 16-20 afholdes vurderingsdag på Hotel Føroyar, Thorshavn.**

Til vore kommende auktioner søges gl. breve til og fra Færøerne, gl. postkort, fragtbreve og alle former for frimærkesamlinger, samt mønter, medaljer, pengesedler og øvrige gamle betalingsmidler. Medbring Deres samlinger til en gratis og uforpligtet vurdering.

**Lørdag den 9. juni** vil der ligeledes være mulighed for vurdering i Deres hjem efter forudgående aftale.
Kontakt os evt. allerede nu for en uforpligtende samtale.

**Tlf. 0045 86 11 47 11**

**CRAFOORD**
**NELLEMANN & THOMSEN**
**AUKTIONSHUS SIDEN 1869**
Skanderborgvej 104-106 · DK-8260 Viby/Århus · Danmark

# Leiðari til dagrøktina

Sørvágs Kommuna søkir eftir leiðara til dagrøktina í Sørvági at byrja 15. august, 30 tímar um vikuna.

Krav: Námsfrøðilig útbúgving.

Skrivlig umsókn verður at senda Sørvágs Kommunu innan 24. juni.

Nærri fæst at vita á tlf. 213122 ella 332004.

**Sørvágs Kommuna**

# Frítíðarskúlin í Nes kommunu

Í sambandi við at frítíðarskúli byrjar í Nes kommunu í august 2001, verður hervið boðað frá, at um tygum ynskja, at barn tygara skal ganga í frítíðarskúlan, so eru tygum vælkomin á kommunuskrivstovuna í vanligari arbeiðstíð eftir umsóknarblaði.

Umsóknarblaðið skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi 15. juni, merkt: »Frítíðarskúlin hjá Nes kommunu« 650 Toftir.

Frítíðarskúlin er fyrst og fremst ætlaður børnunum í 1. og 2. fl., og síðani børnunum í 3. fl. um pláss er.

**Nes kommuna**

gult29 cyan29 magenta29 svart29